# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kílar í framtíðina

Føroyar hava fingið nýggjan fíggjarmálaráðharra. Magni Laksafoss tekur við eftir Bárð Nielsen. Hóast Magni Laksafoss ongar parlamentariskar royndir hevur, er hann kendur frá almenna orðaskiftinum og sum limur av Búskaparráðnum. Við hesum vali, hevur Sambandsflokkurin, samgonga og landið alt uttan iva fingið ein fakliga væl kvalifiseraðan fíggjarmálaráðharra. Hvønn politiskan førleika hann hevur má tíðin so vísa. Vit eins og øll onnur kunnu bara vóna, at hann verður Føroyum ein góður maður.

Hóast Sambandsflokkurin fann sín mann, hevur málið um fíggjarmálaráðharran sett kílar í samgongusamstarvið. Hvør enn hevur rætt í hesum máli, fer bara framtíðin at vísa, um tað góða samstarv verið hevur millum formenninar í Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum, fer at verða avloyst av óvissu, møguliga entá fíggindaskapi.

Neyvan nakar er ósamdur við løgmann um, at tingsessur er suverenur. Her eru tó nøkur men, ið hava verið lítið frammi. Eftir okkara tykki átti Heðin Mortensen at spælt við ærligum kortum og beinanvegin meldað út, hvat hann fór at gera stóð honum í boði at koma á ting. Tá varð allur ivi ruddaður av vegnum og somuleiðis minni grundarlag undir óvissu og ónøgd. Tað hevði verið ein mansligari støða, ið aftur hevði gagnað øllum pørtum. Sum borgarstjóra og eisini sum ISF forseta og harvið sum umboðsmaður fyri unga ættarliðið hevði tað sømt seg fyri hann heldur enn at hugsa taktiskt og at vinna sambandsfíggindum sínum neisir at spælt út ærliga og opið. Og ætlar Heðin sær eina politiska karrieru innan Javnaðarflokkin, átti hann at vitað, at henda støða við ikki at melda út, kann koma at skaða bæði seg sjálvan og flokkin uppá longri sikt. Ávís sambandsfólk eru ímint og onkur eisini hatsk, so handfaringin av málinum, kann í ringasta føri seta Javnaðarflokkin uttan fyri alt vald eftir komandi val.

Og spurningurin er um ikki eisini formaður Javnaðarfloksins sjálvur hevur lagt brenni til hetta bálið. Hann átti at kunnað – uttan at leggja seg út við stýrisskipanarlóg – at greitt Heðini frá negativu avleiðingunum. Also um hann hugsaði, hvat mundi vera best fyri flokkin upp á longri sikt. Kann væl vera, at løgmaður raknar við ein dag við kaldan dreym, har hann situr í andstøðu, nettupp tí hann ikki gjørdi sær nóg stóran ómak fyri at fáa Heðin Mortensen at skilja, at tað hevði tænt bæði honum sjálvum, Javnaðarflokkinum og framtíðar samstarvinum við Sambandsflokkin best, um Heðin alt fyri eitt meldaði út, at hann vildi halga seg býráðsarbeiði fult og heilt og ikki lata sín persón gerast ein trupulleika fyri framtíðar samstarvið millum flokkarnar. Slík gerð hevði verið eitt skot í bógvin hjá teimum sambandsmonnum, ið ynskja J. Eidesgaard, har piparið grør. Við atburðinum hjá Heðini og væntandi hegni løgmans at sannføra Heðin um framtíðar trupulleikarnar hjá flokkinum hevur ávísur vongur í Sambandflokkinum av álvara fingið vind í seglini. Í ringasta føri kann hetta vera byrjanin til enn eina oyðimarkarferð hjá Javnaðarflokkurin í andsstøðu.

**Sosialurin**

# SEV – ein senil organisatión



**HANS TAUSEN OLSEN**
fyrrv. umboðsráðsformaður í SEV

**Stutt viðmerking**

Í blaðgrein um dagarnar skrivar Reidar Nónfjall, at SEV er ein senil organisatión og hevur fleiri grundgevingar fyri síni hugsan.

Sum fyrrverandi umboðsráðsformaður kann eg siga frá, at eg eri so at siga samdur í øllum tí, ið Reidar førir fram.

Eg skal viðmerkja, at í februar 2005 varð nýtt SEV-stýrið valt. Av teimum sjey stýrislimunum valdu fimm Leiv Hansen, f. S. Streymoy til formann, Súna í Hjøllum f. Eysturoynna til næstformann, meðan hinir í meirilutanum vóru Dia Poulsen Suðuroy, Kim Durhuus f. N.Streymoy og Tórur Johannesen f. Sandoy. Meirilutin setti sær høg og alneyðug mál at fremja samb. nýggju viðtøkunum, sum stutt frammanundan ein einmælt umboðsnevnd hevði samtykt.

Farið varð til verka við hesi høvuðsdagsskrá:

SEV skal gerast ein gjøgnumskygdur felagsskapur

Fíggjarætlanin skuldi gerast gjøgnumskygd og skuldi kunna samanberast við roknskapin

Stovna innaneftirlit (sikkerhedskvalitetsstyringssystem samb. tilmæli frá Dansk Energi og krøvunum í Stærkstrømsbekendtgørelsen

4. a) Fíggjarstjóri setast
   b) Framleiðslustjóri setast
   c) Stjóri fyri býtisvirkini setast
   Hesir skuldu hvør á sínum øki hava evstu ábyrgd yvir fyri stýrinum
5. Deild við framtíðarperspektivi sum endamáli skuldi setast
6. Harafturat skuldi setast ein trygdarleiðari samb altjóða reglum, sum hevði beinleiðis tilvísing til stýrið
7. Seta ferð á framtíðar orkuútbyggingar, sum lógu í dvala
8. Fáa skil á starvsviðurskiftum stjórans
9. Fáa skil á fíggjarliga óskilið í Sewave
10. Fremja ein starvsfólkapolitikk, sum samsvarar við nútíðina, har ein starvsfólkaleiðari fekk ábyrgdina

Hesi høvuðspunkt vórðu sett fyri at fáa felagsskapin dynamiskan, nútímans og ikki minst fyri at vinna álit aftur millum landsins politikarar og landsins borgarar, sum eiga SEV.

Hesin fyrr nevndi stýrismeiriluti fekk bert 1 ára arbeiðsfrið, men longu tá vóru øll hesi fyrr nevndu punkt komin undir land og vóru bara eftir at seta í verk. Men her kom trupulleikin. Stjórin saman við minnilutanum og hansara aliansa arbeiddi alt tað, teir vóru mentir at for at fremja sína søk. Við øllum óhugsandi frekleikum, ósannindum og tápiligheit varð roynt at sabotera einhvørjari skilagóðari loysn.

Meirilutin kom tí til ta niðurstøðu, at uppsiga SEV-stjóran, tí álitið á hann var fokið og ikki metti, at samstarvið kundi halda fram. Meirilutin koyrdi stjóran til hús, tí mett var, at hann ikki var rætti maðurin at standa á odda fyri SEV í samband við tær avbjóðingar sum SEV hevði í framtíðini – tá ið hugsað verður tekniskt, fíggjarligt, umsitingarliga og ikki minst opinleika yvir fyri stýrinum.

Sum umboðsnevndarformaður var eg púra samdur við meirilutanum!

Endin var, at Leivur Hansen leyp frá. Var politiskt ryggleysur og gekk brádliga í alliansu við sínar argastu mótstøðumenn. Hann kúvendi so nógv og óskiljandi, at hann saman við hesum monnum fór loyniliga kring Føroya land við ósannindum at fáa tann demokratiskt valda meirilutan burturbeindan. – Uttan yvirhøvur at seta seg inn í málið ella tosa um trupulleikarnar í SEV eydnaðist honum við einum sera teprum meiriluta at bumba SEV aftur í Sovjettíðina, har "páfuglarnir" og ovasta leiðslan tignarliga kunnu standa á einum palli og heilsa borgaranum um eitt tempul, sum ongin fær loyvi at kaga inní.

Stjórin varð settur aftur í starv, hóast stýrið visti; at hann hevur næstan helmingin av umboðsnevndini ímóti sær. Fyri mær er eingin ivi um, at ein stjóri, sum bara hevur ein stóran minniluta ímóti sær eigur at leggja frá sær, og uppaftur meira, tá hann hevur havt ein meiriluta av stýrinum ímóti sær.

Hetta kvettið í SEV man vera eindømi í einum sokallaðum demokratiskum landi!

Eftir at meirilutin var burturbeindur, valdi eg sum umboðsnevndarformaður at trekkja meg tí týðuliga sást, at ikki var pláss fyri øðrum meiningum.

Persónliga skilti eg ongantíð, at nakar gekk við til at stilla upp - og enntá lata seg velja so ódemokratiskt, bara fyri at verja einaveldi SEV-stjórans.

Stutt sagt eri eg samdur við øllum teimum mongu og nú Reidar Nónfjall um, at alneyðugt verður at skifta út meginpartin av dagligu leiðsluni í SEV.

Men hvar eru fjølmiðlarnir? Hava teir ikki eina stóra ábyrgd at røkja í hesum føri?

Runavík, tann 14. mai 2007

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.